NORÐOYATUNNILIN

Norðoyatunnilin p/f
Skansavegur 7
Postboks 1010
FO-110 Tórshavn

Tel +298 350200
Fax +298 350201

# Frágreiðing til aðalfundin 21. juni 2004

**(fyri árið 2003)**

## 0. Inngangur

Til ársaðalfundin 21. juni 2004 er fylgjandi greitt:

- tunnilsgerð fer fram frá Leirvík og Klaksvík. Pr 19. juni 2004 eru sprongdir 1129 m úr Leirvík og 498 m úr Klaksvík, tilsamans 1627 m av tunli.
- atkomuvegurin til tunnilsmunnan í Leirvík er gjørdur upp undir áskotið
- arbeiðsstøðan bæði fyri tunnils- og vegagerð fylgir tíðarætlanini. Væntandi verður komið í gjøgnum í mai 2005.
- jarðfrøðisligu viðurskiftini hava higartil verið áleið sum væntað.
- lekin Leirvíks megin, eins og Klaksvíks megin, er sera lítil
- hendur einki óvæntað, verður roknað við, at tunnilin kann latast upp fyri ferðslu august 2006.
- elarbeiði v.m. verður gjørt klárt til útbjóðingar tíðliga komandi heyst
- grótið úr tunlinum Leirvíkarmegin verður nýtt til uppfylling við Kráartanga í Leirvík, meðan ein partur verður fluttur til Klaksvíkar ísv. havnargerð. Grótið Klaksvíksmegin verður nýtt til ymsar uppfyllingar hjá kommununi har
- avtala er gjørd við Íleggingargrunnin fyri Føroyar um byggifígging og endaliga fígging.

## 1. Nevndin og felagið

Nevndin hevur í 2003 havt 16 fundir og 5 fundir higartil í ár.

Á seinasta aðalfundi var øll nevndin afturvald.

Felagið hevur felags skrivstovu við Vágatunnilin p/f á Skansavegi 7.

Einans nevnd og stjóri eru sett í felagnum. Øll onnur starvsfólk verða nýtt í samstarvi við Vágatunnilin p/f.

Partapeningurin var seinast hækkaður á eykaaðalfundi tann 20. dec 2002 við 32,5 mió kr, soleiðis at samlaði partapeningurin nú er 62,5 mió kr.

## 2. Virksemi

Felagið hevur í 2003 endað fyrireikingar av undirsjóvartunnilsgerð millum Eysturoy og Borðoy, og hevur gjørt avtalur um tunnils- og vegagerð v.m. og er farið undir arbeiðið. Arbeiðið hjá felagnum hevur í høvuðsheitunum fevnt um evnini, ið nærri eru lýst niðanfyri.

### 2.1 Forkanningar

Ongar forkanningar eru gjørdar í árinum.

### 2.2 Loyvi og lendi

Endalig góðkenning er fingin frá Landsverki, við tí viðmerking at tunnilsmunnin í Klaksvík møguliga skal leingjast nakað í mun til ætlaða projekti. Fylgt verður við, um kavi legst við tunnilsmunnan, og um neyðugt verður munnin longdur nakað.

Loyvi er fingið frá friðingarnevndini í Eysturoyar sýslu til at fremja vegagerðina sunnan fyri Leirvík.. Loyvi er fingið frá friðingarnevndunum í Norðoya sýslu til at fremja vegagerðina í Klaksvík. Yvirfriðingarnevndin hevur staðfest bæði loyvini.

Felagið hevur luttikið í fornfrøðisligum royndargrevstri í Klaksvík, sum varð fyriskipaður av Fornminnissavninum og sum hevði ávirkan á hvussu endaliga linjuføringin á vegnum kom at vera í Klaksvík.

Samskifti hevur verið við Jarðarráðið og aðrar eigarar um neyðuga lendið til vegagerðina og tunnilsmunnarnar. Roynt var at samráðast við eigararnar, men tað gjørdist neyðugt at heita á landsstýrismannin um at ognartaka neyðugt lendi í Klaksvík

### 2.3 Tunnilsarbeiðið

Felagið bjóðaði 9. sep 2003 arbeiðið at gera undirsjóvartunnilin millum Eysturoy og Borðoy í innbodnari licitatión millum 3 norðurlendsk byggisamtøk. Við licitatiónina lógu boðini millum 248,8 – 338,8 mió kr.

Eftir viðgerð av tilboðum og samráðingum, var tann 12. nov 2003 undirskrivaður sáttmáli við Føroya Konsortiið um gerð av undirsjóvartunnli millum Eysturoy og Borðoy. Undir samráðingunum varð avtala gjørd um at meginparturin av arbeiðinum skuldi gerast fyri fastan prís, soleiðis at endaliga sáttmála upphæddin gjørdist 262,8 mió kr. Afturat hesum kemur príshækkingar, broytingar, elarbeiði og tilfar, skelti og trygdarútgerð, byggileiðsla, eftirlit og fíggingarkostnaður v.m

Arbeiðið uppá tunnilin byrjaði í Leirvík tann 18. dec 2003, tá ið fyrsta skotið var latið av. Síðani var farið at rigga meira til og rættulig gongd kom á tunnilsgerðina fyrst í hesum árinum.

### 2.4 Vegarbeiðið

Vegagerðin verður boðin út í tveimum umførum. Fyrra umfarið snýr seg um avgrevstur, spreinging og uppfylling í sambandi við vegir, arbeiðsvegir, arbeiðspláss og tunnilsmunnar.

Hetta arbeiðið byrjaði Leirvíks megin í sep 2003 og var liðugt í jan 2004.

Klaksvíks megin dróg út við hesum arbeiði, av tí at ikki fekst semja við eigararnar av lendinum har vegurin skal vera. Tað eydnaðist kortini at fáa semju við eigararnar har sjálvur tunnilsmunnin er, soleiðis at farast kundi undir fyrireikingarnar har í jan 2004. Eftir at ognartøkan er framd var í mars 2004 farið undir vegagerðina.

### 2.5 Fígging v.m.

Lániavtala var tann 12. nov 2003 undirskrivað við Íleggingargrunnin fyri Føroyar, ið veitir fígging í byggitíðini og endaliga fígging tá ið tunnilin verður tikin í nýtslu.

Fyri at fáa kunnleika til nýggjastu royndirnar hjá feløgum ið varða av tunlum og innkrevjingarskipanum, vitjaði nevnd og stjóri, saman við nevndini í Íleggingargrunninum í sep 2003, í Noregi hjá OPS E39, Frøya/Hitra, Krifast, Eiksundsambandet og Fannefjordtunnelen.

### 2.6 Heilsa, trygd og umhvørvi

Tunnilsarbeiðstakarin hevur gjørt tilbúgvingarætlan fyri tunnilin í gerð, og er hendan umrødd saman við avvarðandi myndugleikum.

Farið er undir arbeiðið við tilbúgvingarætlan fyri tunnilin í nýtslu. Í arbeiðinum luttaka løgreglan, Leirvíkar kommuna, Klaksvíkar kommuna, Landsverk, Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús, Brunaumsjónin og Fiskimálaráðið.

Váðagreining er gjørd fyri tunnilin.

Krøv eru sett arbeiðstakaranum, um reinsing og burturleiðing av vatni, sum verður pumpað úr tunlinum og sum setur frá arbeiðsøkinum. Tiltøk eru sett í verk at fyribyrgja at vegir dálkast óneyðugt í sambandi við grótflutning.

## 3. Mál av samfelags- og samfelagsbúskaparligum týdningi

Verkætlanin er løgd í eitt sjálvstøðugt partafelag, ið hevur endaligu fíggjarligu ábyrgdina. Sum ásett í anleggslógini er felagnum játtað tilsamans 235 mió kr til verkætlanina. Verkætlanin er ein tann størsta á samferðsluøkinum seinastu árini. Lønargjøldini í samlaða arbeiðinum kann metast út frá byggiútreiðslunum uppá 368 mió kr, lønarpartinum, ið kann metast til 35-40% og byggitíðini o.u. 3 ár; hetta vil svara til at goldnar verða einar 45 mió kr um árið í lønum í byggitíðini.

Talið má takast við fyrivarni. Endaliga býtið av kostnaðinum yvir byggitíðina og hvussu stórur partur av kostnaðinum, ið er lønir, velst um hvussu arbeiðstakarin leggur arbeiðið til rættis. Ávirkanin á føroyska búskapin velst eisini um lønmóttakararnir búgva og verða skattaðir í Føroyum.

Sum nevnt omanfyri, fer meginparturin av tilfarinum úr tunlinum til útbyggingar hjá Leirvíkar og Klaksvíkar kommunum, ið harvið fáa munandi nyttu av hesum.

## 4. Rakstur og íløguætlan fyri komandi árini

### 4.1 Fíggjarligt

Fíggjarætlanin fyri verkætlanina vísir eina samlaða kapitalnýtslu uppá 405 mió kr og er sundurgreinað niðanfyri.

| **Íløga og útreiðslur** | | **Fígging** | |
|---|---|---|---|
| Byggiútreiðslur | 368 | Av fíggjarlógini | -235 |
| Renta | 19 | Lán | -170 |
| Diskontering | 10 | | |
| Rakstur í byggitíð | 8 | | |
| | 405 | | -405 |

Íløguætlanin fyri komandi árini er mett út frá gjaldsavtalum og verða íløgurnar mettar at fella á henda hátt:

| Ár | Av fíggjarlóg | Byggi útreiðslur | Rakstur í byggitíðini | Renta | Fíggjar tørvur |
|---|---|---|---|---|---|
| 2001 | -30,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | -30,0 |
| 2002 | -32,5 | 3,0 | 0,0 | -0,9 | -60,4 |
| 2003 | 0,0 | 12,5 | 2,0 | -1,8 | -45,1 |
| 2004 | 0,0 | 154,9 | 2,0 | 2,2 | 120,2 |
| 2005 | -32,5 | 113,4 | 2,0 | 7,6 | 209,1 |
| 2006 | -32,5 | 83,7 | 2,0 | 12,0 | 268,6 |
| Virðið av komandi gjøldum | -97,1 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 170,0 |
| Tilsamans | -224,6 | 367,5 | 8,0 | 19,1 | 170,0 |
| Komandi gjøld: | | | | | |
| 2007 | -32,5 | | | | |
| 2008 | -32,5 | | | | |
| 2009 | -42,5 | | | | |
| **Tilsaman** | -107,5 | | | | |

Samanumtikið kann sigast, at arbeiðið er komið væl í gongd og fylgir tíðarætlanini. Komið er reiðiliga út undir Leirvíksfjørð vestani frá, meðan tunnilin eystani frá er komið niður um kotu 0. Enn eru einir ¾ eftir av tunlinum og spennandi er at vita hvussu har fer at gangast. Nevndin hevur tað treysti, at arbeiðið, við teimum arbeiðsmannagongdum, ið eru fastlagdar hjá arbeiðstakara og byggileiðslu, kann fremjast trygt og stundisliga innan karmarnar av ætlanini, sum greitt er frá omanfyri.

Tórshavn 21. juni 2004

Bergur í Garði, form. Jens Kári Vilhelm, næstform.

Heri M. Hammer Oyvindur Brimnes

Bjarni Askham Bjarnason

/ Dávid Reinert Hansen